## Dagar og messur

Í gomlum døgum høvdu dagar og messur nógv meira at siga enn nú á døgum. Tó tykist tað, sum at fólk eru farin at geva sær meira far um tann mentanararv, sum liggur goymdur í hesum parti av søgu og átrúnaðarsøgu okkara, serliga úti í heimi. At døgum og messum knýta seg fyribrigdi um fólkalív og átrúnað, og eru hetta sera spennandi og læruríkar frásagnir.

”Dagar og nøvn í álmanakkanum” eftir Axel Tórgarð er ein dýrgripur, tá vit tosa um álmanakkaárið og kirkjuárið og tær frásagnir, sum knýta seg at teimum. Bókin kom út í broyttari, øktari útgávu í 2008.

Ein álmanakki verður eisini róptur ein kalendari. Orðið kalendari kemur úr latíni, Calendae, og merkir fyrsti dagur í mánaðinum. Tann álmanakki, vit í dag nýta, er tann gregorianski álmanakkin. Tað hava verið nógvir álmanakkar gjøgnum tíðina, av tí at fólk hava havt fyri neyðini at tíðarfesta hendingar. Hvør tíð hevur havt sín tørv á tíðarfesting. Teir kendastu álmanakkarnir eru tann rómverski álmanakkin, tann julianski álmanakkin og tann gregorianski álmanakkin, sum byggir á teir báðar fyrru álmanakkarnar. Hesir tríggir líkjast nakað, men aðrir mátar hava eisini verið nýttir at tíðarfesta, og her er primstavurin kendur í Noregi.

**Januar** hevur navn eftir rómverska gudinum *Janus*.

**Februar** kemur av latínska navninum *februare*, ið merkir at reinsa.

**Mars** hevur navn eftir rómverska gudinum *Mars*.

**Apríl** kemur av latínska orðinum *aperire*, ið merkir at *lata upp*.

**Mai** er nevndur eftir rómversku gudinnuni fyri gróðri og grøði, *Maju*.

**Juni** eitur eftir rómversku gudinnuni *Juno*, ið var kona Jupiters.

**Juli** hevur navn sítt eftir *Julius Cæsar*, keisara.

**August** hevur navn sítt eftir rómverska keisaranum *Augustusi*.

**September** kemur av orðinum *septem*, ið merkir sjey. September var sjeyndi mánaður í gamla rómverska kalendaranum.

**Oktober** kemur av orðinum *octo*, ið merkir átta, áttandi mánaðurin í gamla rómverska kalendaranum.

**November** kemur av latínska orðinum *novem*, ið merkir nýggju, nýggjundi mánaður í gamla rómverska kalendaranum.

**Desember** kemur av orðinum *decem*, ið merkir tíggju. Tíggjundi mánaður í gamla rómverska kalendaranum.